almannastovan
almannastovan@almannastovan.fo
www.almannastovan.fo



# FÍGGJARLEIÐARI

Vit eru í støðugari menning og leita vit eftir einum fíggjarleiðara, sum kann vera við til at halda áfram við at menna stovnin á tí fíggjarliga økinum. Á deildini starvast í løtuni 5 starvsfólk. Fíggjarleiðarin hevur beinleiðis tilvísing til almannastjóran.

Fíggjarleiðarastarvið á Almannastovuni er fjølbroytt, avbjóðandi, krevjandi og hugkveikjandi. og ført tú eitt starv, har tú ført stóra ávirkan á, hvussu stovnurin verður rikin.

Við støði í virðunum loyalitet, ábyrgd og álit kemur tú, saman við teimum sera dugnaligu starvsfólkunum á deildini, at hava ábyrdina av at skipa alt fíggjarøkið. Tú kemur tí at vera hornsteinurin innan fíggjarliga økið á stovninum og vanta vit tí, at tú kanst hugkveikja og verða ein hollur stuðul til leiðsluna.

Royndir innan almenna umsiting er ein fyrimunur, men tó ikki eitt krav.

**Leiðarin hevur ábyrgdina av**
- at ráðgeva og vegleiða leiðsluna í fíggjar-, lønar- og roknskaparviðurskiftum
- at samstarva og samskifta við Almanna- og heilsumálaráðið og aðrar myndugleikar
- at gera fíggjarætlan og roknskap
- innkeypi og at skipa innkeypspolitikkin
- at fylgja upp og hava eftirlit við rakstrinum og teimum lógarbundnu útreiðslunum
- at gera mannagongdir á fíggjarøkinum
- leiða verkætlanir, eisini tvørfakligar
- at skipa leiðsluhagtøl og almenn hagtøl, umframt greiningarverkætlanir
- øðrum ad hoc uppgávur

**Persónurin**
- sær samarbeiðið sum vegin fram til eitt gott avrik
- sær starvsfólkið sum týdningarmiklasta tilfeingið at menna
- er ágrýtin og himprast ikki við at taka avgerðir
- hevur góðan analytiskan sans
- hevur royndir innan fíggjarstýring
- megnar at hava fleiri bóltar í luftini í senn.

**Førleikakrøv**
- viðkomandi prógv frá hægri lærustovni, so sum polit, oecon ella aðra viðkomandi útbúgving
- leiðsluroyndir og royndir innan økið
- evni til at raðfesta og tilrættisleggja arbeiðið
- støðugt at kunna dagføra sína vitan innan roknskaparlógir og reglur
- er virkisfús/ur og eltir uppgávurnar frá byrjan til enda
- góð samstarvsevni
- góðan førleika innan edv

**Vit kunnu bjóða**
- starv í einum spennandi umhvørvi í støðugari menning við nógvum og fjølbroyttum avbjóðingum
- starv við møguleika fyri persónligari og fakligari menning.
- starv í einum góðum arbeiðsumhvørvi, har dentur verður lagdur á tað einstaka starvsfólkið.

**Lønar- og setanartreytir**
Lønar- og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Nærri upplýsingar**
Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Petru Johnsdóttir Joensen, stjóra á tlf. 353510 ella 215480.

**Umsókn**
Umsóknir við avriti av prógvum o.ø. skulu vera Almannastovuni, Smyrilsvegur 20, postsmoga 3096, 110 Tórshavn, í hendi seinast 23. mai 2008.

KREA




